Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	03.11.2023
Mál nr.:	23/20624
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	25.10.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Skattaumskipan 2024 og 2025, javning av skattastiganum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. September 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. Desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður skattur teirra, ið eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d-f, sbr tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis:
1) Er inntøkan lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin.
2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 180.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 14% av restini.
3) Er inntøkan kr. 180.000 ella hægri, men lægri enn kr. 280.000, verða kr. 16.100 latnar av kr. 180.000 og 15% av restini.
4) Er inntøkan kr. 280.000 ella hægri men lægri enn kr. 380.000, verða kr. 31.100 latnar av kr. 280.000 og 20% av restini.
5) Er inntøkan kr. 380.000 ella hægri, men lægri enn kr. 700.000, verða kr. 51.100 latnar av kr. 380.000 og 25% av restini.
6) Er inntøkan kr. 700.000 ella hægri, verða kr. 131.100 latnar av kr. 700.000 og 30% av restini."

2. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður skattur teirra, ið eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d-f, sbr. tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis:
1) Er inntøkan lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin.
2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 180.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 13% av restini.

3) Er inntøkan kr. 180.000 ella hægri, men lægri enn kr. 330.000, verða kr. 14.950 latnar av kr. 180.000 og 15% av restini.
4) Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri men lægri enn kr. 450.0000, verða kr. 37.450 latnar av kr. 330.000 og 20% av restini.
5) Er inntøkan kr. 450.000 ella hægri, men lægri enn kr. 600.000, verða kr. 61.450 latnar av kr. 450.000 og 25% av restini.
6) Er inntøkan kr. 600.000 ella hægri, verða kr. 98.950 latnar av kr. 600.000 og 30% av restini.”

§ 2

Stk. 1. § 1, nr. 1 kemur í gildi 1. januar 2024.
Stk. 2. § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2025.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at seta í verk eina skattaumskipan, sum minkar inntøkuskattin. Tað skal loysa seg betur at arbeiða.

Síðstu nógvu árini er skattabyrðan flutt frá avgjøldum til inntøkuskatt.

Orsøkin er, at hvørki skattastigi ella avgjøld verða javnað við prís- ella lønarvøkstri. Avgjøldini eru í størstan mun ásett sum føst krónuupphædd fyri hvørja eind, meðan skattastigini í stigvaksandi skattaskipanini eru føst.

Frá 2016 til 2022 eru ongar broytingar av týdningi gjørdar í landsskatti ella søluavgjøldum og innflutningsavgjøldum.

Lønarvøkstur og ein skattastigi, sum ikki verður javnaður, gera, at inntøkurnar frá landsskatti eru vaksnar til um 2 mia. kr. í 2022, sum er ein vøkstur á út við 50 prosent síðani 2016, meðan avgjøldini eru óbroytt um 250 mió. kr. um árið.

Hetta er við til at trýsta føroyska arbeiðsmarknaðin, tí skatturin hækkar hjá teimum, sum arbeiða í Føroyum, meðan hann í veruleikanum minkar hjá teimum, sum arbeiða uttanlands og ikki rinda inntøkuskatt her í landinum.

Lógaruppskotið er liður í eini skattaumskipan, ið fevnir um hesi lógaruppskot:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir (Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskiveiðifrádráttinum og avtøka av uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av punktgjøldum á brennievni og broyting av heiti)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, javning av skattastiganum)

Lógaruppskot	Hvat	Fíggjarlig ávirkan 2024	Fíggjarlig ávirkan 2025	Fíggjarlig ávirkan 2026-2028	Samanlagt 2024 til 2028
Ásetingarlógin	Landsskattatalva - skattaumleggingin	100	100	0	200
Skattalógin	Broyting í frádráttum vm.	-13	-15	-25	-53
Serligt avgjald á brenniolju	hækking av avgjaldinum og strikan av afturbering	-50	-35	0	-85
Framleiðsla og innflutningi	F-gass, bensin og diesel avgjøld hækka	-37	0	0	-37
Samanlagt		**0**	**50**	**-25**	**25**

Talvan omanfyri lýsir ymisku lutirnar í skattaumskipanini 2024-28.Umframt inntøkur frá lógaruppskotunum í skattaumskipanini, koma 10 mió. kr. frá avgjøldum á f-gass. Sí uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum).

Við hesum uppskotinum verður skattastigin javnaður eins og skattatrýstið á lág- og miðalløni verður lækkað.

Ein nærri greining av skattaumskipanini er í fylgiskjali 2, *Skattaumskipan 2024 og 2025*.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu verður eingin landsskattur rindaður av inntøku undir kr. 65.000.

Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 235.000, verður eingin skattur latin av fyrstu kr. 65.000 og 15% av restini.

Er inntøkan kr. 235.000 ella hægri, men lægri enn kr. 330.000, verða kr. 25.500 latnar av kr. 235.000 og 20% av restini.

Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 44.500 latnar av kr. 330.000 og 25% av restini.

Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 162.000 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at javna skattastigan.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður skattastigin javnaður, eins og skattatrýstið á lág- og miðalløni verður lækkað.

Skattastigin hevur verið óbroyttur síðstu 8 árini. Lønirnar eru harafturímóti hækkaðar 20% (roknað eftir lønarvísitalinum hjá lønardeildini, har 2016 = 162,7 og 2023 = 195,24). Tí er skattatrýstið á lønarinntøku støðugt hækkað, og alsamt fleiri lønmótakarar rinda hægri skatt av síðst vunnu krónuni. Ein høgur skattur á síðst vunnu krónu er serliga avlagandi og dýrt fyri samfelagið.

Skattalættin verður tí latin soleiðis, at stóra fjøldin av lág- og miðalløntum rindar lægri skatt av síðst vunnu krónuni. Við hesum fer betur at loysa seg at arbeiða fulla tíð ella at taka eina

eyka vakt. Fyri at hægstu inntøkurnar ikki skulu hava líka stóran skattalætta verða ovastu stigini í skattastiganum flutt niður.

Skotið verður upp, at inntøkuskatturin verður broyttur soleiðis:

Landsskattatalva 2023

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	15%	15%
Landsskattur 2	235.000	5%	20%
Landsskattur 3	330.000	5%	25%
Landsskattur 4	800.000	5%	30%

Landsskattatalva 2024

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	14%	14%
Landsskattur 2	180.000	1%	15%
Landsskattur 3	280.000	5%	20%
Landsskattur 4	380.000	5%	25%
Landsskattur 5	700.000	5%	30%

Landsskattatalva 2025

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	13%	13%
Landsskattur 2	180.000	2%	15%
Landsskattur 3	330.000	5%	20%
Landsskattur 4	450.000	5%	25%
Landsskattur 5	600.000	5%	30%

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Veittur verður ein lætti í inntøkuskattinum á 100 mió. kr. í 2024 og 100 mió. kr. í 2025, tilsamans 200 mió. kr.

Víst verður annars til hjálagda fylgiskjal 2 *Skattaumskipan 2024 og 2025.*

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

Eftir at skattastigin er broyttur, er tørvur á at gera tøkniligar tillagingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Við uppskotinum verður skattastigin javnaður. Javningin ber í sær at serliga lág- og miðallønt fara at rinda ein lutfalsliga munandi lægri skatt.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Skattastigin verður javnaður í tveimum stigum. § 1, nr. 1 sum er galdandi fyri 2024, og § 1, nr. 2, sum er galdandi fyri 2025 og fylgjandi ár.

Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir tær framdu broytingarnar í landsskattatalvunum fyri 2024 og 2025 sæð í mun til landsskattatalvuna fyri 2023.

Landsskattatalva 2023

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	15%	15%
Landsskattur 2	235.000	5%	20%
Landsskattur 3	330.000	5%	25%
Landsskattur 4	800.000	5%	30%

Landsskattatalva 2024

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	14%	14%
Landsskattur 2	180.000	1%	15%
Landsskattur 3	280.000	5%	20%
Landsskattur 4	380.000	5%	25%
Landsskattur 5	700.000	5%	30%

Landsskattatalva 2025

	frá (kr.)	skattur (%)	í alt (%)
Landsskattur 1	65.000	13%	13%
Landsskattur 2	180.000	2%	15%
Landsskattur 3	330.000	5%	20%
Landsskattur 4	450.000	5%	25%
Landsskattur 5	600.000	5%	30%

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Skattastigin verður javnaður í tveimum stigum. § 1, nr. 1 sum er galdandi fyri 2024, og § 1, nr. 2, sum er galdandi fyri 2025 og fylgjandi ár.

Fíggjarmálaráðið, 03. november 2023

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skattaumskipan 2024 og 2025